

*Eyðun Nolsøe og Lawetz spældu seg víðari frá triðja innleiðandi umfari í Prix Føroyum, sum varð hildið leygarkvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eyðun Nolsøe og Lawetz víðari

**Triðja umfarið av Prix Føroyum var merkt av melodiøsum popptónleiki, og dómararnir valdu Eyðun Nolsøe og Lawetz burtur úr teimum seks bólkunum, sum spældu**

PRIX

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú eru seks bólkar klárir til hálvfinaluna í Prix Føroyum, eftir at tveir bólkar leygarkvøldið spældu seg víðari í kappingini.

Triðja innleiðandi umfarið var í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og seks bólkar vóru á pallinum. India legði fyri, og síðani spældu eisini Direct Level, Rok, Lawetz, Frostbit og Eyðun Nolsøe.

India legði fyri við tungum og myrkum rocktónleiki, men annars var meira popptónleikur á skránni, enn vanligt hevur verið, og tað vóru eisini tveir poppbólkar, sum komu víðari í kappingini.

Lawetz spældi sín sermerkta svingandi popptónleik, sum við blásarum og frískum rútmum stundum nærkaðist latíntónleiki. Eyðun Nolsøe spældi meira klassiskan popptónleik, og væl varð spælt og sungið.

Hesir báðir bólkar komu víðari í kappingini og skulu saman við GoGo Blues, Lama Sea, All That Rain og Makrel spæla til hálvfinaluna í Trongisvági.

Fjórða og seinasta innleiðandi umfarið í Prixnum verður leygarkvøldið.

Sosialurin hevur meira um Prix Føroyar í blaðnum í morgin.

## Helga skal stjórna Bryggjuni

Nevndin fyri grunnin "Den Nordatlantiske Brygge" hevur gjørt av at seta Helgu Hjörvar sum stjóra frá 1. apríl 2005 at rokna

Í tíðindaskrivi verður, sagt, at fleiri enn 30 umsøkjarar til starvið sum stjóri mentamiðdeplinum fyri londini í útnorðri, sum lat upp fyri stívliga einum ári síðani.

Sagt verður annars, at við Helgu Hjörvar hevur Norðurbryggjan fingið ein dugnaligan stjóra við drúgvum leiðsluroyndum úr Íslandi og Føroyum og við íslendsk/danskari útbúgving innan leiklist og hartil knýttum virksemi.

Helga Hjörvar hevur í meira enn 20 ár arbeitt við mentanarligum samstarvi millum Norðurlond og londini í Útnorðir, tey seinastu 5 árini sum stjóri fyri Norðulandahúsinum í Føroyum. Stóra talið av sambondum, hon hervið hevur knýtt, kemur nú Norðurbryggjuni tilgóðar, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Søren Haslund Christensen, nevndarformaður sigur annars, at hann gleðir seg til at samstarva við Helgu Hjörvar í komandi árunum, og hann væntar, at Norðurbryggjan av álvara fer at mennast og fáa enn størri virksemi undir leiðslu av nýggja stjóranum.

Móttøka fyri nýggja stjóranum verður á Norðurbryggjuni týsdagin, 29. mars.

-jm

## Ali Celebi eitur nýggi stjórin hjá P/F Trygd

Hesum boðaði felagið frá fríggjadagin. Christian C. Nielsen hevur annars verið stjóri í felagnum síðani 1997, tá Føroya Banki tók kappingina upp við Tryggingarfelagið um marknaðin.

Ali Celebi hevur áður verið deildarstjóri í Den nordiske Projekteksportfond í Finnlandi, har hann hevur havt ábyrgd av virksemi grunsins í norrønum íleggingarverkætlanum. Seinastu fimm árini hevur hann starvast hjá Codan Forsikring.

Hann er giftur føroysku Onnu Mariu Joensen úr Havn, og hevur tí góðan kunnleika til føroyskt mál og mentan.

-jm

Ársins myndakapping

FOTO MARATHON 2005

12. mars kl. 10.00

Film ella digitalt
(talgilt)

Vel ímillum 3 kappingar

1. Vaksin 14 ár og eldri
- 35 mm. film/aps ella einnýtistól
2. Vaksin 14 ár og eldri - digital
3. Børn 8-13 ár - serligt Harry Potter einnýtistól

Sera stórir og góðir vinningar eru til nr. 1-2-3 í hvørjum bólki.

**Vinningar Film vaksin:**
1. X-50 Konika/Minolta 5 mill. pixel digitalt myndatól. **Virði kr. 4.995,-**
2. Apex ferðaseðil frá Atlantic Airways
3. Minolta C-160 myndatól til vanl. film. **Virði kr. 1.395,-**

**Vinningar Digital vaksin:**
1. Canon PowerShot A95, 5 mill. pixels digitalt myndatól. **Virði kr. 3.995,-**
2. Apex ferðaseðil frá Atlantic Airways
3. Minolta C-160 myndatól vanl. film. **Virði kr. 1.395,-**

**Vinningar Børn:**
1. Canon PowerShot A-95 5 mill. pixel digitalt myndatól. **Virði kr. 3.995,-**
2. Olympus 105 g myndatól vanl. film. **Virði kr. 1.695,-**
3. Olympus 35 mm. myndatól til vanl. film **Virði kr. 495,-**



**Luttøkugjald:**
Vaksin: kr. 145,-
Børn: kr. 85,-

Kom inn í 3-aran og fá ein faldara

Í sambandi við tiltakið hava vit eina rúgvu av góðum tilboðum.

ATLANTIC AIRWAYS · KONICA MINOLTA · CAV · Canon · SMS · FossFotech · FESTINA · OLYMPUS · ILFORD · CANDINO SWISS WATCH · PENTAX

3arin
3-arin/Fotodeildin
Boks 1057-1058
Fo-110 Tórshavn
Tel 35 35 32
www.3-arin.com